




# Ljósini tendrað



*Hóast keðiligt veður var væl av fólki samankomið, tá jólatræið varð tendrað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Jólatræið á Vaglinum í Havn varð tendrað leygardagin. Samstundir vórðu onnur ljós, sum hongd verða upp til jóla, eisini tendrað. Býurin er í jólahýri**

JÓLATRÆ

*Edvard Joensen*

Væl av fólki var savnað í miðbýnum í Havn seinnapartin leygardaign, tá stóra jólaræið á Tinghúsvøllinum varð tendrað. Samstundis vórðu onnur ljós ymsastaðni í miðbýnum eisini tendrað.

Tað var sjálvur jólamaðurin, sum tendraði jólatræið. Hann kom saman við trimum hjálparmonnum og ikki færri enn 12 smáum nissum við brandbilinum at tendra træið. Sjálvandi til æru fyri børnini, sum halda tað vera nógv stutligari, enn tá ein býraðspolitikari ella rithøvundur heldur eina mentaða røðu og tendrar træið.

Hóast veðrið ikki var tað besta, fekk stóra mannmúgvan bara væl burturúr. Eit groft æl kom, júst tá tendrast skuldi, men tað fekk ikki rikið fólk burtur kortini.

Eftir, at jólatræið var tendrað, spjaddist fólk í býnum. Onkur vitjaði ymsar handlar, summi gingu bara og hugdu og lurtaðu, meðan onnur fóru ein túr á kondittaríið og annars gjørdi slíkt, ein ger í jólahýri ein slíkan dag.

Ymisk onnur tiltøk vóru eisini í gongugøtuni hesa løtuna, so fólk fekk rætiliga hugnað sær, hóast veðrið hevði hug at halda nakað annað.

# Ársins jólakonsertir við Eivør

KONSERT



Eivør Pálsdóttir fer aftur í ár at hava sínar nógv umrøddu jólakonsertir. Tað er hugtakandi og hjartanemandi, tá okkara fólkakæri sangfuglur syngur jólasangir, og kirkjukonsertirnar í fjør vóru nakað av tí størsta, tú kanst uppliva innan tónleik.

Eivør fer í ár at hava tvær jólakonsertir, og tær verða í Havn og í Fuglafirði. Saman við gøtugentuni fara nakrir av bestu tónleikarunum í Íslandi at spæla. Hetta er ein bólkur, sum Eivør hevur spælt í seinastu tíðina, og tey hava longu bergtikið íslendingar við sínum framførslum. Eivør er ein tónleikaligur gullfuglur, og tað verður ferð eftir ferð staðfest á palli.

Eivør hevur langt síðani fingið sítt fólksliga gjøgnumbrot í Føroyum. Hon verður verið ein berandi kraft í bólkinum Clickhaze, sum hevur havt so nógvan undanvind seinastu tvey árini. Hon er eitt óhoyrt føroyskt sangtalent, sum eisini hevur tikið ummælarar uttanlands av fótum við sínum orkufullu og hugtakandi framførslum.

Tónleikararnir, sum spæla saman við Eivør, eru: Petur Gretarson (trummur), Birgir Bragarson( kontrabass) og Eddi Lauroson (elgittar)

Á jólakonsertunum fer Eivør at syngja kendar jólasangir, og Felagskórið Gøta/Leirvík fer at syngja við til tveir sangir. Í steðginum verður kaffi og rísgreytur at fáa, so tað verður rættur jóladámur á konsertunum.

Fyrra konsertin verður í Norðurlandahúsinum 7. december klokkan 19.30. Seinna konsertin verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 8. december kl. 20.00 Atgongumerki fáast í forsølu á Kunningarstovunum í Havn, Runavík og í Fuglafirði.

